


*Nr. 1* *12. januar 2014* *74. árg.*

# Gleðiligt nýggjár

Tíðin rennur sum streymur í á, títt munnu bylgjurnar falla; lítlum báti rekist eg á, áraleysur at kalla. Soleiðis yrkir Fríðrikur Petersen, og satt er, sum skaldið sigur; tíðin fer, og vit fylgja við henni. Ongin kann steðga og siga nei, eg vil ikki við. Tó nýtist okkum ikki at fara hjálparleys avstað við streymi tíðarinnar. Vit kunna stýra báti okkara móti ávísum miði og máli, og vit mugu hava stavnhald okkara væl handan fyri miðið og málið, um ikki rákið skal føra okkum av leið. Nógv er í streymi tíðarinnar, sum kann vera okkum til bága; og av okkum sjálvum eru vit ikki før fyri at halda beina kós og koma á mál.

Tó eru vit ikki hjálparleys á tíðarinnar havi, tí at ein er, sum vil vera við okkum og geva okkum mátt og megi til at halda ímóti málinum, um vit av hjarta venda okkum til hansara. Navn hansara møtir okkum sjálvan nýggjársdag og ljóðar í øllum kirkjum okkara. Og tað er Jesusnavnið. Vit syngja í einum nýggjárssálmi: í Jesu navni, Harri vár, várt land, várt fólk, várt heim í ár at stimbra, styrkja, styðja; gev frið og dagligt breyð, gev troyst í sorg og neyð, gev trúnni kraft og mátt, hjálp at vit dag og nátt mót lívsins landi miða. Og tað eiga vit øll at gera, at seta kós í hesum stóra navni móti lívsins landi. Tá kunnu vit við áðurnevnda skaldi siga: Tíðin rennur sum streymur í á fram í Harrans navni, lítlum báti eri eg á – himnastrond fyri stavni.

Gleðiligt nýggjár!

# Nýggjársgávan

Ein nýggjársmorgun komu tríggir arbeiðsmenn inn á gólvið hjá keypmanninum, ið var arbeiðsgevari teirra. Teir komu at ynskja honum: ”Eydnuberandi nýggjár.” Keypmaðurin gleddist um vitjan teirra og spurdi teir, hvat teir heldur vildu hava í nýggjársgávu: eina Bíbliu ella 100 krónur. Bíbliuni gav hann sítt besta viðmæli.

Tveir teirra bóru í bøtuflaka fyri seg, at teir ikki tóku ímóti Bíbliuni. Teimum tørvaði peningin. Tann triði tók við gleði ímóti Bíbliuni, og tá ið hann opnaði hana, datt ein 500 kr-seðil út úr henni.

Bilsin og spyrjandi hugdi hann at keypmanninum, sum segði við hann: “Tak peningin, hann er ætlaður tær, tí at tú fram um peningin valdi orð hansara, sum í gjár, í dag, ja, til allar tíðir er hin sami.”

# Felagsbøn er máttmikil

Einaferð bar so á, at ein stór riva kom í hin veldiga kupulin á Pæturskirkjuni. Fólk gjørdust uppskakað og ráðaleys.Tá legði ein byggimeistari eitt gløðandi jarnband um kupulin, og tað, sum mannamegi ikki megnaði, tað megnaði jarnbandið; tað varð lagt gløðandi á kupulin og kólnaði við so miklari megi, at rivan var drigin saman. Kupulin var heilur aftur.

Gud hevur givið børnum sínum eitt tílíkt gløðandi band. Nýtið tað, um Djevulin loypir split í tykkara millum. Bandið eitur felagsbøn. Kemur split í tykkara millum, tá er mangan torført at tosa saman aftur, men lætt at biðja saman.

Leggið tí saman hendur og biðið í Jesu navni um kraft og ljós Heilaga Andans. Tá skulu tit síggja, at hin rivnaði kupulin verður heilur aftur – og Djevulin er útihýstur.

*Skovgaard-Petersen/ t. týddi*

---

“... sum vit fyrigeva skuldarum okkara.” Matt. 6,12. Hetta er djarvasta bønin í Faðirvár. Hon beinir burtur rættin hjá okkum at hevna og at kenna okkum firtin, ja, enntá at tosa við onnur um støðuna.

*e.c.* ums.

# Til lukku, Agnas!

*“Menniskjusonurin er komin at leita upp hitt farna og at bjarga tí.”*
*Luk. 19,10.*

Tony Campolo var seint eitt kvøldið farin inn á eina matstovu í einum fremmandum býi. Einastu viðskiftafólkini inni har vóru skøkjur. Meðan hann situr og fær sær ein bita, hoyrir hann ein siga, at í morgin fyllir Agnas.

Kvøldið eftir kom hann aftur við einari lagkøku, sum hann hevði keypt. Á køkuni stóð “Til lukku, Agnas”. Campolo greiðir frá: “Hurðin fór upp og inn kom Agnas. Ongantíð á ævini havi eg sæð eitt fólk so hamskift og ovfarið. Eyguni vættust, og hon fór at gráta. Eg visti ikki, hvat ið eg skuldi siga annað enn: “Skulu vit ikki biðja saman?”

Tá ið Campolo lítur aftur um bak, tykist tað honum heldur løgið, tað, sum hann gjørdi: Ein sosiologur, sum leiðir eitt bønarmøti við skøkjum inni á einari matstovu! Men tað kendist rætt! Eg bað fyri Agnasi, fyri frelsu hennara, og at lív hennara mátti broytast, og at Gud vildi sýna henni góðsku sína.

Tá ið eg var liðugur, spurdi maðurin aftan fyri barrina: “Hvørja kirkju hoyrir tú til?” Eg svaraði: “Til ta kirkju, sum heldur føðingardagar fyri skøkjur.” Tøgn var eina løtu, so segði hann: “Nei, tað gert tú ikki! Tí slíkar kirkjur eru ikki til! Um tær høvdu verið til, so hevði eg langt síðani skrivað meg inn har.”

Men tað var eina slíka kirkju, Jesus kom at byggja. Hann bjóðar náði, sum tú ikki finnur aðrastaðni. Hann kom at leita upp tey glataðu og frelsa tey. Hann elskar at bjarga og endurnýta menniskju í pínu: Tey gloymdu, tey vanvirdu, tey fyriløgstu og brúktu, tey útspiltu.

“... et Ord til Dagen”
*Effie Campbell* umsetti.

# Ótti

Ótti er at liva í framtíðini, áðrenn hon er komin. Perfektionistar seta sær mál, sum ikki ber til at røkka. Tú kanst ógjørligt læra nakað, uttan at tú gert mistøk; lær og gakk so víðari. Gud sigur: “Óttast ikki, tí at eg eri við tær.” Jes. 41,10. Spyr tí teg sjálvan, hvat ið Hann ynskir og gevst við at vilja tekkjast øðrum. Sálomon segði: “Mannaótti leiðir í snerrur, men tann, sum lítur á Harran, verður bjargaður.” Orðt. 29,25.

“... et Ord til Dagen” *e.c.* ums.

# Takk fyri farna árið

Sunnudagsblaðið ber nú við ársbyrjan sína bestu tøkk til allar blaðsins vinir. Takk tit, sum biðin og óbiðin senda blaðnum tilfar og peningagávur. Takk til øll avgreiðslufólkini og til tykkum, sum bera blaðið út í heimini.

Latið okkum standa saman um arbeiðið, og hvør í sínum lagi røkja tað, sum okkum verður litið til so væl, vit kunnu. Tað væntar Jesus av vinum sínum, hóast teir mangan verða miskendir og vanvirdir í lívinum.

Hóast mótstríð og trupulleikar væntar Jesus av vinum sínum, at teir halda á í trúgv og treysti at ganga ørindi fyri Guds ríki. Tað var ikki lætt hjá Jesusi sjálvum ella lærusveinum hansara upp ígjøgnum tíðirnar; men tað hevur verið gjørt og eigur framvegis at verða gjørt í tí treysti, at

*Jesu-navnið aldri bliknar,*
*slítist ei av tíðartonn,*
*Jesu-navnið aldri viknar,*
*Guds orð eru ævigt sonn.*
*Tað ber boð til ung og gomul,*
*gevur lív og frið í sál,*
*og tað savna kann øll somul,*
*leiðir sálir fram á mál!*

---

Vit liva enn í tíðarskeiðinum, har profetiið hjá Jóeli er galdandi. Hvat skal til, so at Heilagi Andin aftur tekur fult ræði á kirkjuliðunum? Allir religiøsir kappar mugu brennast. Vit hava gjørt so nógvar skrivaðar og óskrivaðar lógir um gudslív, at tey, sum koma í nánd av okkum, annaðhvørt sovna, ella fáa tey andaneyð.

*e.c.* ums.

---

*Sunnudagsblaðið*
*ynskir øllum Harrans signing í nýggja árinum*

*Heilsan blastjórin*

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta, 35 77 74




**_Nr. 2_** **_26. januar 2014_** **_74. árg._**

# Bønarvegurin

*Biðið uttan íhald 1. Tess. 5,17.*

Tveir menn komu eftir vegnum. Annar var so heilt vónleysur. Øll framtíðin lá myrk og døpur fyri honum. Hin royndi at menna hann upp, men alt til onkis. Hugtungur og vónleysur svaraði hann: ”Hvat kann verða gjørt við tveimum tómum hondum?” Tá svaraði hin blídliga og álvarsliga: ”Tú kanst leggja hendurnar saman í bøn til Guds!”

Hvussu ofta gloyma vit ikki henda undurfagra vegin burtur úr hvørjari neyð: bønarvegin. Vit hava lyndi til at seta okkara lít til tað, sum vit kunnu síggja og halda á, ognir okkara. Men tá ið tær týnast og verða burtur - og tað kunnu tær sum døgg fyri sól – tá verða vit vónleys og dapurskygd. Hetta gerast vit, tí vit ikki lærdu at takka Gudi fyri gávurnar, vit høvdu fingið frá honum. Vit settu okkara lít til gávurnar og ikki gevaran. Í slíkum stundum hava vit sanniliga fyri neyðini at verða mint á, at tað nyttar at halda tómar hendur saman í bøn til okkara náðiríka gevara, Gud og faðir okkara í himlinum.

Tá ið vit hava eitthvørt í hondunum, ber ikki so væl til at halda hendurnar saman. Menniskju hava altíð báðar hendurnar fullar. Tey fáa ikki sagt takk, tey fáa ikki biðið. Tey hava altíð ovmikið at takast við, tíðin er altíð ov stutt. Gud fær hvørki tíð ella tøkk frá teimum. Tí er so torført hjá einum ríkum at koma inn í Guds ríki. Hann hevur so ilt við at leggja frá sær og halda bøn.

Hjá mongum eru hendurnar so útdálkaðar í synd, at tey troysta sær ikki at halda tær saman í bøn, men tey fara longri og longri burtur í synd. Hesi mistaka seg í stórum. Rætti vegurin er at koma

fram fyri Gud við allari synd síni. Tað er tøkkin, sum Gud ynskir sær fyri alt, hann gevur okkum.

Jesus nýtti bønarvegin. Hann fór burtur frá hinum niðan á fjallið ella út í oyðimørkina at halda bøn, og í bønini fekk hann kraft til verk sítt, og við hesi kraft sigraði hann á sjálvum deyðanum.

*Bønin er mín himmalstigi,*
*lyftir meg frá hesi verð;*
*faðir, tá eg til tín biði,*
*upp frá jørð mín andi fer,*
*leitar til tín ljósa sal,*
*vegin vísir orð títt væl.*

*Ei má heimsins sorg oss tyngja,*
*faðir vár í himli býr,*
*orð hans ugga kann og yngja*
*hvørt Guds barn, sum á hann trýr.*
*Hvør, sum himlavegin fann,*
*halgan frið og sælu vann.*

# Tí eri eg fráhaldsmaður...

**Samrøða við Sten Sørensen, prest í Lyngdal Misjonsmenighet.**

1. Hvør er týdningarmesta orsøkin til, at tú ert fráhaldsmaður?

Fyrst og fremst eri eg fráhaldsmaður, av tí at eg fegin vil vísa samhuga og næstakærleika móti teimum mongu, sum hava fingið lív síni og heim síni oyðiløgd av alkoholi. Tað hevði verið ov framført og nasvíst av mær at sitið og hugnað mær við alkoholi, sum hevur oyðilagt so nógv fyri so mong. Harnæst vil eg vera ein fyrimynd - eisini fyri tey, sum stríðast á hesum øki.

2. Hvussu leingi hevur tú havt hetta sjónarmiðið?

Eg havi havt hetta sjónarmiðið í 18 ár. Elsti sonur okkara er ættleiddur. Vit fingu hann, tá ið hann var fimm mánaðir gamal. Vit vistu lítið um hansara grundarlag; men tað lá í kortunum, at rætta mamma hansara hevði trupulleikar við rúsdrekka. Tá gjørdu vit av, at hann ongantíð skuldi fáa alkohol í heimi okkara. Hetta sjónarmiðið hava vit ongantíð angrað!

3. Verður tú virdur fyri tína fráhaldsstøðu?

Ja, tá ið eg grundgevi fyri mínari støðu, verði eg altíð virdur.

4. Kemur tú ofta upp í samrøður ella kjak um tað at vera fráhaldsfólk?

Eftir at eg havi skrivað eina grein um málið, havi eg havt fleiri góðar samrøður. Kanska hava fólk ikki hug at práta við prest um hetta evnið? Men tað skulu tey bara gera, tí eg vil fegin geva eina væl grundaða vegleiðing.

5. Tað tykist sum fráhaldssjónarmiðið víkir í umhvørvum, har tað fyrr var sjálvsagt við fráhaldi, t.d. millum trúgvandi. Hvat heldur tú um tað?

Eg havi eisini givið mær far um, at alkoholið hevur fingið atgongd í kristnum umhvørvum. Mær tykir tað vera syrgiligt. Sum trúgvandi tørvar okkum ikki slík stimbrandi evni fyri at uppliva gleðina. Kristnilívið er so mikið sterkt, at mær tørvar ongan rús við síðuna av.

6. Hvat krevst, fyri at fráhaldssjónarmiðið skal fáa meira vind í seglini?

Doyurin má leggjast á, hvussu gott tað er at vera edrúur. At vísa fyrilit móti øðrum er ein stásiligur eginleiki, sum gevur eina innaru gleði. Tað er uppbyggjandi at vísa størri fyrilit móti øðrum enn sær sjálvum. Ikki minst haldi eg, at fráhaldssjónarmiðið kemur í hásæti, um veking kemur í landi okkara. Tá verða alkoholkranarnir skrúvaðir fyri, meðan himmalkranarnir fara at standa víðopnir! Tað er hent fyrr, og mátti tað endurtikið seg!

“Ennå er det håp”
*Effie Campbell* umsetti.

# Hvussu koma vit á beint?

Ein dagin sótu børnini inni í skúlastovuni og skrivaðu. Brádliga gjørdist so myrkt. Lærarinnan reistist og tendraði ljósið. Løtu seinni ringdi klokkan, og børnini fóru út í fríkorter. Tá sóu tey, at tað hevði kavað, meðan tey høvdu sitið inni. Allur skúlagarðurin lá fjaldur undir einum fínum, hvítum teppi.

Tríggjar gentur funnu tá uppá at fara at spæla eitt serligt spæl. Tær skuldu ganga frá skúlatrappuni og yvir til portrið, ið var beint yvirav. So skuldu tær vita, hvør teirra kundi gera ta beinastu linjuna við sínum fetum.

Tvær teirra hugdu niður fyri føturnar og royndu at seta tann eina fótin so beint framman fyri hin, so at linjan skuldi gerast so bein sum gjørligt. Tá ið tær komu yvir til portrið, vendu tær sær spentar við; men tá sóu tær, at teirra fótafet snúðu sær higar og hagar, meðan hin triðja hevði gingið so snórabeint.

"Hvussu bart tú teg at?" spurdu tær undrandi.

"Eg hugdi yvir móti portrinum, áðrenn eg byrjaði. Tveir stølpar standa hvør síni megin portrið, og ein kúla er til pynt oman á hvørjum stólpa. Eg festi míni eygu á aðra kúluna, og so gekk og gekk eg. Eg tók ongantíð eyguni av kúluni," svaraði hin triðja gentan.

Svarið til spurningin "Hvussu koma vit á beint?" er hetta, vit skulu festa okkara eygu á Jesus og ikki hyggja niður fyri føtur okkara at okkara trupulleikum.

*Effie Campbell* umsett

# Guds orð

Ein prestur í London sigur frá:

Stutt síðani varð eg kallaður til eina konu, ið lá fyri deyðanum. Hon var frímóðig og kendi seg trygga í trúnni á Jesus Kristus, og eg spurdi hana, hvussu hon hevði funnið frelsara sín. “Eg las hetta,” segði hon og rætti mær ein samanlagdan pappírslepa. Eg hugdi at honum. Tað var eitt petti av eini amerikanskari avís, har prentaður var ein samandráttur av eini prædiku, sum ein prestur hevði hildið í London. Hitt prentaða orðið hevði víst henni vegin til umvendingar.

”Hvaðani hava tygum fingið hetta pappírið?”

”Tað var ballað um ein pakka, sum eg fekk úr Avstralia.“

„Hugsið tygum um: so undarligir eru vegir Guds. Ein prædika verður hildin í London, tikin uppaftur í Amerika í einari avís, sum send verður  til Avstralia. Haðani verður hon send aftur til Onglands um ein pakka og ber boðskapin um frelsu og náði til hesa kvinnu, orðið, ið kemur frá Gudi.“

Guds orð verður aldri fyri ongum. Henda heilsanin er góð at hava við inn í nýggja árið.

*Tað er ein Gud, sum var og verður.*
*Um alt á foldum fer í sor,*
*so heldur tó hans halga orð,*
*og aldri vikna Harrans gerðir.*
*Eg seti álit mítt á hann,*
*tað Harrans orð meg lærir.*

---

Í 1938 profeteraði ein maður í eini hvítusunnukirkju í Noregi soleiðis: “Eg síggi, at oljan streymar upp úr Norðsjónum fram við norsku strondini. Tá ið tað hendir, vilja løgin og øðrvísi ting henda í verðini - og Jesus kemur aftur.” Tað var alt, sum hann segði. Men tað við oljuni fram við norsku strondini ljóðaði ov ótrúligt at vera satt. Tí var hann biðin um at seta seg og tiga. Tað var ógvuliga eyðmýkjandi fyri hann. Tveir triðingar av profetiinum eru útgingnir, seinasti triðingurin kemur eisini at ganga út: Jesus kemur aftur!!! Men við okkum sigur orðið: “Vanmetið ikki profetaorð!” 1. Tess. 5,20.

*e.c.* ums.

---

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta,  35 77 74